## Fundur um kvinnur í politikki



Í kvøld, týskvøldið, kl. 19.30 verður almennur fundur í Losjuni í Havn um kvinnur í politikk. Fyrireikararnir siga í tíðindaskrivi, at ásannandi, at einans 3 kvinnur hava sæti í løgtinginum, og eingin kvinna er í landsstýrinum - hevur Javnstøðunevndin arbeitt við ymsum uppskotum, ið kunnu stimbra undir gongdina at fáa fleiri kvinnur at luttaka í landspolitikki. Á fundinum fer formaðurin í Javnstøðunevndini, Kári á Rógvi, løgfrøðingur, at greiða frá hugskoti, sum kann vera við til at fáa betri javnvág millum kvinnur og menn í politiska arbeiðinum í løgtinginum. Eftir framløguna verður høvi til at seta spurningar og gera viðmerkingar. Tað eru politisku flokkarnir, sum standa fyri tiltakinum. Tó ikki Miðflokkurin.

## Milliónir til kvinnubókmentir

Grunnurin A.P.Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal hevur gjørt av at stuðla norðurlendskum vinnubókmentum við góðum trimum milliónum krónum. Peningurin verður latin til danskt-svenska samstarvsætlanina, Nordisk Kvindelitteraturshistorie på Internettet. Visiónin er, at ein kvinnubókmentaportalur á donskum, svenskum og eingilskum máli skal gera norðurlendska kvinnubókmentasøgu 1-5 ókeypis atkomuliga fyri øll.

# Kvinnulistar ein reellur møguleiki

**Kristianna Rein heldur tað vera eitt frálíkt hugskot at gera ein kvinnulista í flokkunum. – Hetta hevur verið uppá tal fyrr, og er als onki reyðsokkahalløj, men ein reellur og lógligur møguleiki at fáa kvinnur inn, sigur hon**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kristianna Rein, fyrrverandi býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin í Havn, og virkin innan javnstøðuøkið í mong ár, heldur tað vera eitt frálíkt hugskot at gera ein innanhýsis kvinnulista. Hon greiðir frá, at tað fyrr hevur verið upp á tal at stilla tveir listar upp. Eisini sigur hon, at hon hevur altíð verið heit fyri einum uttanflokka kvinnulista, men at tað eisini hevur verið tosað um at stilla kvinnulistar upp paralelt við vanliga listan.

- Hetta er ikki nakað reyðsokkahalløj, men ein reellur møguleiki hjá kvinnum at koma fram, sigur Kristianna Rein, sum eisini heldur, at við einum reinum kvinnulista høvdu kvinnurnar í valfeløgunum eisini havt betri møguleika at sloppið framat í valstríðnum. - Tað hevði verið løgið, um listin ikki varð boðin við til ymsu tiltøkini í valstríðnum. Og tað er ein sannroynd, at tá stóru fundirnir eru, eitt nú síðsti stóri fundurin í Norðurlandahúsinum, er kríggj í flokkunum um at sleppa við. Og sjálvandi eru tað oftast mannligu atkvøðuslúkarnir, sum troka seg framat tá, sigur hon.

### Ikki troka hvørja aðra

Í Sosialinum í gjár greiddu vit frá um lógargrein í vallógini, sum heimilar politiskum flokkum at stilla upp fleiri listar til løgtingsval. Í hesum sambandi greiddi Ingrid Henriksen úr Suðurstreymoyar Javnaðarfelag frá, hvussu tað kann koma kvinnuligum valevnum til góðar, um flokkurin ger av at stilla tveir listar upp í Suðurstreymi. Tá eiga báðir listarnir sínar atkvøður, og valevnið við flestum atkvøðum á hvørjum lista fær sess, á sama hátt, sum tá roknað verður við ymsum flokkum.

Samfelagsfrøðingurin Jógvan Mørkøre segði, at tað geniala er, at kvinnurnar á einum internum kvinnulista ikki oyðileggja tað fyri hvørji aðra, fyri á tann hátt bert at slóða fyri monnunum. Samstundis gevur tað tí veljaranum, ið vil atkvøða kvinnu inn, trygd fyri, at atkvøðan kemur einari kvinnu til góðar.

### Sterkur listi

Kristianna Rein heldur eisini, at tað tá er týdningarmikið at fáa ein góðan og sterkan kvinnulista, við kvinnum, sum vilja vera virknar í valstríðnum.

- Um kvinnur ætla sær framat, skulu tær gera sær greitt, at tað er neyðugt at brúka albogarnar, og vísa, at tær veruliga ynskja at verða valdar, eins og menninir, sigur Kristianna Rein. Hon sigur, at kvinnur, sum velja at bjóða seg fram skulu hava eitt veruligt ynski um at verða valdar, og gera sær púra greitt, hví tær vilja gera seg galdandi.

Kristinanna Rein sigur seg ivast í, um føroyskar kvinnur veruliga ynskja at vera við í politikki.

- Nógvar kvinnur bjóða seg fram innan leiðslu á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Men tað letur til at vera torført at fáa tær at bjóða seg fram í politikki, sigur hon.

### Lága støði

Spurd, hví hetta man vera so, sigur hon seg ivast.

- Men kanska er tað politiska klimaið, og støðið, sum sýnist ógvuliga lágt til tíðir. Tí eg dugi við mínum besta vilja ikki at síggja, hví ein politisk karriera ikki skal kunna sameinast við familjulívið, sigur Kristianna Rein. Og hon vísir á, at tað snýr seg um at skipa tað soleiðis, at tá nógv fundarvirksemi er, so taka onnur yvir, um smá børn eru í familjuni.

- Tí tað tekur nógva tíð, ongin ivi er um tað. Men hyggja vit til dømis at Annitu á Fríðriksmørk, sum fær mammu sína at hjálpa sær, tá maðurin er til sjós. Og hjá mær sjálvari var tað púra natúrligt, at maður mín Marius tók sítt tørn í heiminum, eins og eg sjálv, sigur Kristianna Rein.

Hon endar við at senda eina áheitan til yngri kvinnur, um at taka stríðið fyri javnstøðu í politikki upp.

- Mín tíð er farin. Eg havi gjørt mítt gjøgnum mong ár, og kundi hugsað mær, at yngri kreftir tóku yvir. Tey hugsa sjálvandi øðrvísi og hava ein annan inngang til alt øki, og hava óivað onnur hugskot og aðrar arbeiðshættir eisini, sigur Kristianna Rein, sum heldur tað vera eins týdningarmikið nú sum fyrr, at fáa kvinnur valdar.

- Men eg havi varhugan av, at fólk eru vorðin meiri tilvitað um, hví tað er so týdningarmikið við kvinnum, sæð úr einum fólkaræðisligum sjónarhorni.



*Í Sosialinum í gjár greiddu vit frá um lógargrein í vallógini, sum heimilar politiskum flokkum at stilla upp fleiri listar til løgtingsval. Kristianna Rein heldur, at á kvinnulistanum høvdu kvinnurnar eisini havt betri møguleika at sloppið framat í valstríðnum*

## Ongan avgjørda meining

**Formaðurin fyri javnaðarflokkin á Løgtingið hevur onga avgjørda meining um tankan at gera kvinnulistar inni í Javnaðarflokkinum, tí hetta er so nýtt**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kristian Magnussen, formaður fyri Javnaðarflokkin á Løgtingi, hevur ikki gjørt sær nakrar avgjørdar niðurstøður um tankan um at gera ein reinan kvinnulista innan fyri í Javnaðarflokkin, sum vit umrøddu í Sosialinum í gjár.

- Hetta er hugskotið er so spildurnýtt fyri mær, at eg havi ikki havt stundir at gera mær nakra greiða niðurstøðu um hetta, sigur hann.

Men í fyrstu atløgu er tað hansara grundleggjandi hugsan, at tey, sum fáa flest atkvøður eru tey, sum vera vald og at tey skulu øll vera á einum lista.

Hann leggur kortini dent á, at hetta skal ikki skiljast sum um at hann er ímóti at gera kvinnulistar, tí hann hevur ikki havt stundir at taka eina støðu og spurningurin er heldur ikki viðgjørdur innanfloks.



Hinvegin heldur hann eisini, at flokkarnir eiga at hugsa meiri um javnstøðu, tá ið valevnislistar verða mannaðir og álitisstørv í flokkinum annars verða sett.